# Toftamenn ætla at reisa seg aftur



*Toftamenn ætla sær at reisa seg, eftir vánaliga úrslitið seinasta vikuskiftið, men ásanna at dysturin á Mølini er sera torførur*
*Mynd: Savnsmynd*

**Men teir ásanna, at uppgávan verður torfør á Eiði, har EB/Streymur hevur vunnið tríggjar teir seinastu heimadystirnar**

EB/STREYMUR-B68
*Jóannes Hansen*

**Yvirlit yvir dystirnar um vikuskiftið:**

**1. deild menn**
Skála- GÍ
HB-B36
TB-KÍ
EB/Streymur-B68
NSÍ-VB

**2. deild menn**
HB-B71
Sumba-B36
ÍF-LÍF
KÍ-NSÍ
VB-FS Vágar

**3. deild menn**
ÍF-AB
B68-TB
B71-HB
B36-Royn
GÍ-FS Vágar

**1. deild kvinnur**
GÍ-b36
HB-B68
Skála KÍ

B68 skal til Eiðis í morgin. Eftir meiri enn hálva kiksaran á heimavølli ímóti TB hava teir sett sær sjálvum knívin á strúpan. Um teir ikki vinna, so verður møguleikin fyri heiðursmerkjum uppaftur kámari, enn hann er nú. Men samstundis ásanna teir, at uppgávan á Mølini verður sera trupul. EB/Streymur hevur vunnið tríggjar teir seinastu heimadystirnar. Síðst vunnu teir 4-0 á TB, meðan B68 ikki megnaði meiri enn málleysan javnleik á heimavølli ímóti tvørámonnum.

-Vit kunnu bara takka okkum sjálvum fyri, at tað kiksaði ímóti TB. Lagið hevur verið gott undir venjingini í hesi vikuni, og vit halda okkum hava møguleika at vinna á Eiði, sigur liðformaðurin hjá B68, Hans Fróði Hansen, sum samstundis heldur, at úrslitini hjá EB/Streymi benda á, at tað verður torført.

Sammett við manningina ímóti TB eru miðvallararnir Fróði Benjaminsen og Fríðin Ziskason tøkir aftur. Teir vóru báðir leikbannaðir síðsta sunnudag.

### Sjálvsálitið framvegis gott

Eftir góðu úrslitini á heimavølli høvdu teir í EB/-Streymi vóna, at teir skuldu fáa stig burturúr ferðini til Vágs. Men tað eydnaðist ikki. EB/Streymur kom til hús aftur við 3-0 tapi.

-VB var væl betri enn okkara lið, og tí høvdu teir uppiborið at vinna. Tað skal eingin ivi vera um tað. Men eg harmist um, at vit ikki fingu betri møguleikar at hita upp. Í góðari tíð høvdu vit boðað Strandferðsluni frá, at vit komu suður við 1. deild og unglingaliði. Vit koyrdu við vanligu rutuni av Tvøroyri og suður eftir, og tað hevði við sær, at tíðin varð so mikið knøpp, at um vit skuldu sleppa norður aftur sunnukvøldið, so var ikki møguligt at hita upp hjá 1. deildarliðnum. Tað var harmuligt, serliga tá havt verður í huga, at vøllurin er rættuliga ólíkur øðrum vallum, sigur EB/Streyma venjarin Trygvi Mortensen, sum enn eina ferð undirstrikar, at heimasigurin var rudduliga uppiborin.

Hjá EB/Streymi er Ingi Hansen farin av aftur landinum, og so kemur tað sera illa við, at Sorin Anghel framvegis er skaddur. Hann spældi ikki við í Vági, og tað er sera ivasamt, um hann verður við í morgin.

Hagtøl fyri tíggju tey seinastu árini:

| | '01 | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HB-B36 | 1-2 | 2-2 | 4-2 | 2-3 | 1-0 | 3-1 | 5-1 | 5-0 | 1-1 | 2-1 |
| Skála-GÍ | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| NSÍ-VB | 1-1 | 4-0 | 1-0 | 4-1 | 1-4 | - | 0-3 | - | - | 0-1 |
| TB-KÍ | - | - | - | 0-4 | - | 1-1 | 2-2 | 0-6 | 1-1 | 2-2 |
| EB/S-B68 | 1-2 | - | - | - | - | - | - | 0-0 | - | - |

## 1. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 11 | 7 - 2 - 2 | 32 | 12 | 20 | 23 |
| 2 | NSÍ | 11 | 6 - 3 - 2 | 20 | 13 | 7 | 21 |
| 3 | KÍ | 11 | 6 - 2 - 3 | 26 | 15 | 11 | 20 |
| 4 | B68 | 11 | 5 - 4 - 2 | 16 | 14 | 2 | 19 |
| 5 | GÍ | 11 | 6 - 1 - 4 | 18 | 17 | 1 | 19 |
| 6 | B36 | 11 | 5 - 2 - 4 | 35 | 18 | 17 | 17 |
| 7 | VB | 11 | 4 - 3 - 4 | 10 | 8 | 2 | 15 |
| 8 | EB/Streymur | 11 | 3 - 1 - 7 | 13 | 23 | -10 | 10 |
| 9 | TB | 11 | 1 - 3 - 7 | 11 | 42 | -31 | 6 |
| 10 | Skála | 11 | 0 - 3 - 8 | 8 | 27 | -19 | 3 |

## 2. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FSV | 10 | 7 - 2 - 1 | 34 | 8 | 26 | 23 |
| 2 | Sumba | 10 | 5 - 3 - 2 | 15 | 12 | 3 | 18 |
| 3 | LÍF | 10 | 4 - 2 - 4 | 18 | 16 | 2 | 14 |
| 4 | ÍF | 10 | 4 - 1 - 5 | 22 | 20 | 2 | 13 |
| 5 | KÍ | 10 | 3 - 4 - 3 | 14 | 15 | -1 | 13 |
| 6 | B36 | 10 | 3 - 4 - 3 | 11 | 16 | -5 | 13 |
| 7 | NSÍ | 10 | 4 - 1 - 5 | 10 | 15 | -5 | 13 |
| 8 | B71 | 10 | 3 - 3 - 4 | 12 | 9 | 3 | 12 |
| 9 | HB | 10 | 3 - 2 - 5 | 15 | 16 | -1 | 11 |
| 10 | VB | 10 | 3 - 0 - 7 | 8 | 32 | -24 | 9 |



# Todi í harðari kapping

**Sunnudagin taka FC København og Todi Jónsson móti uppflytarunum úr Farum. Kappingin um pláss í álopinum er beinhørð, nú fyrrverandi svenski landsliðsleikarin, Jørgen Petterson, er klárur eftir skaða**

SUPERLIGAN
*Heini í Skorini*



*Todi Jónsson er í harðari kapping um pláss í álopinum hjá FCK. Sunnudagin taka teir móti Farum á heimavølli*

Gestirnir í Parkini sunnudagin vera uppflytararnir úr umstrídda Brixtofte býnum, Farum Boldklub. Eftir tap í fyrsta umfari vann Farum seinasta vikuskiftið 3-2 á heimavølli móti Viborg, og hava teir sostatt fingið eina góða byrjan í Superliguni.

Men nú stendur størsta royndin higartil fyri framman, tá liðið skal spæla á útivølli skal móti Toda Jónsson og FCK, sum liggur á odda í Superliguni við fýra stigum eftir tveimum dystum. Allir leikarar eru tøkir uttan vinstribakkurin Peter Christiansen, og tí er optimisma í hópinum hjá Hans Backe og hansara monnum.

Ein gamal FCK kenningur verður at síggja á beinkinum hjá Farum í Parkini sunnudagin. Venjarin hjá Farum eitur Christian Andersen, og er hann fyrrverandi venjari hjá FCK í einum umstríddum tíðarskeiði, tá Brian Laudrup m.a. spældi í FC København.

### Hørð kapping um álopsplássini

Føroyingurin í FCK, Todi Jónsson, var nógv plágaður av skaða í upptaktini til Superliguna. Hann kom tó inn í fyrsta dystinum móti Viborg og megnaði enntá at javna, og seinasta vikuskiftið byrjaði hann inni í álopinum saman við suðurafrikansku superstjørnuni, Sibusiso Zuma, tá FCK vann 3-1 í Køge. Hóast Todi spældi væl, varð hann skiftur út fyri Peter Møller, og Møller takkaði fyri við at leggja FCK á odda 2-1. Við máli sínum trýstir Peter Møller fyri einum plássi í byrjunaruppstillingini saman við sjálvskrivaða Zuma.

Umframt Peter Møller sum kappingarneyta er fyrrverandi svenski landsliðsleikarin, Jørgen Petterson, eisini klárur eftir skaða. FCK keypti Petterson undan kappingini frá týska stórfelagnum Kaiserslautern, og FCK venjarin Hans Backe hevur úttala seg um, at FCK hevur stórar vónir til svenska áleyparan.

Felagið hevur í mong ár ikki havt nakran áleypara, sum hevur gjørt seg galdandi millum toppskjúttarnar í Superliguni, og FCK leiðslan hevur víst á, at Jørgen Petterson møguliga er leikarin, sum veruliga kann gerast nýggi málslúkarin í Parkini. Jørgen Petterson fær møguliga sín fyrsta dyst fyri FCK sunnudagin.

Tískil er óvist, um Todi verður við frá byrjan í triðja umfari í Superliguni móti Farum sunnudagin í Parkini, nú bæði Zuma, Møller og Petterson eru »fit for fight«. Hóast Peter Møller fyrr hevur skotið mál sum innskiftari fyri Toda, hevur venjarin fleiri ferðir víst Toda álit, men tað er ein sannroynd, at kappingin um pláss í álopinum er harðari enn nakrantíð.

# - Als ikki væntað nakað

**19 ára gamli KÍ verjuleikarin, Atli Danielsen, er spildurnýtt andlit í føroyskum landsliðshøpi, eftir at landsliðsvenjarin Henrik Larsen fyrstu ferð úttók hópin hósdagin. Atli Danielsen er tó ikki millum 18 teir fyrstu til vinardystin móti Liktinstein**

LANDSLIÐIÐ
*Heini í Skorini*

19 ára gamli Atli Danielsen hevur í fjør og í ár ment seg til ein av stuðulsleikarunum á besta KÍ liðnum, og hóast hann ikki hevur fingið nógva umrøðu í fjølmiðlunum, er hann við sínum avrikum millum mest lovandi leikarar í landinum.

Avrik hansara eru nú lønaði við einum plássi í bruttohópinum hjá Henrik Larsen og Jógvan Martini Olsen, sum telur 22 mans, og hóast hann ikki er millum teir fyrstu 18 í vinardystinum móti Liktinstein, er hetta ein greið ábending til unga KÍ leikaran.

- Eg hevði als ikki vænta at fáa boð frá landsliðnum, og hóast hetta er ein bruttohópur til ein vinardyst, verður ógvuliga spennandi at lukta til tað, sigur Atli Danielsen. Hann sigur, at málið er at gerast fastur maður í hópinum, men at hann fyrst og fremst ynskir at spæla væl fyri KÍ, og síðani síggja, hvussu langt tað røkkur. Atli hevur verið stuðulsleikari á føroysku ungdómslandsliðunum, har Jógvan Martin Olsen hevur verið venjari, og tískil kennir hjálparvenjarin nógv til Atla Danielsen.

Eitt annað nýtt andlit er eisini á føroyska landsliðnum, og er tað viðleikarin hjá Atla Danielsen, Ovi Nysted úr KÍ. Ovi er 22 ára gamal, og tíverri fingu vit ikki fatur á Ova Nysted.



*Bert 19 ára gamli Atli Danielsen hevur fyri fyrstu ferð fingið boð frá A-landsliðnum, og er hann millum teir fyrst 22 í bruttohópinum hjá Henrik Larsen*

Klæmint Matras:

# -Ikki vónbrotin

LANDSLIÐIÐ
*Páll Holm Johannesen*

Eitt av mongu evnunum til landsliðið er B36-stríðsmaðurin, Klæmint Matras. Klæmint varð úttikin til dystin ímóti Slovenia seinasta heyst, og var eisini við á venjingarleguni á Kypern fyrr í vár. Eftir at landsliðið til dystin ímóti Liktenstein er úttikið, var navnið hjá B36-miðvallaranum ikki á listanum.

Spurdur um hann var vónbrotin, svaraði Klæmint, at tað var hann als ikki, tí hann aldrin rættiliga hevur verið í landsliðshitanum, og at tað eru nógvir góðir spælarar um boðið á miðvøllinum, og tí var hann als ikki vónsvikin at ikki vera úttikin hesaferð.

Fyri at vinna sær pláss á miðvøllinum á landsliðnum, má Klæmint kappast við so royndar leikarar sum Fróða Benjaminsen, Sámal Joensen og Julian Johnsson, sum í fleiri ár hava verið fastir fúsir á landsliðnum.

Klæmint vísir eisini á, at hann hevur nógv darvaður av skaðum í ár, og kappingarárið í ár hevur ikki hilnast eins væl og tað í fjør, og tí hevði hann ikki væntað at verið úttikin til landsdystin ímóti Liktinstein.



*Eitt av mongu evnunum til landsliðið, Klæmint Matras, var als ikki vónbrótin av, at ikki at vera ímillum teir 22 leikararnir til dystin ímóti Liktenstein*
*Mynd: Savnsmynd*